# BankNordik 92.000 nýggjar kundar

Leo Poulsen

Við keypinum av pørtum av Amagerbanken økist virksemið hjá BankNordik munandi, og innlánini fara úr 8,9 upp í 14,2 milliardir, meðana útlán og trygdir vaksa úr 8,4 upp í 12,9 milliardir við teimum 92.000 nýggju kundunum, bankin fær

BankNordik vann kappingina um sunna partin av Amagerbanken.

Janus Petersen var í gjár í Danmark og samráddist um seinastu smálutirnar við Finansiel Stabilitet, og BankNordik endaði við at fáa sunna partin av Amagerbanken fyri 350 milliónir krónur í goodwill, sum tað eitur.

- Keypið ger strategisku ætlanina um at vaksa á danska marknaðinum til veruleika. Vit hava hildið eitt vakið eyga við møguleikanum fyri at yvirtaka áhugavert virksemi, sum hóskar til tann háttin, vit ynskja at reka banka. Eins og Amagerbanken leggja vit dent á tætt samskifti við kundarnar og tøtt sambond við lokala marknaðin. Í bankanum leggja vit harumframt dent á sterka kredittstýring, tí eru vit nøgd við, at meginparturin av kundunum er privatkundar og minni fyritøkur. Keypið styrkir sostatt frammanundan sterka váðaprofilin hjá bankanum, sigur Janus Petersen, forstjóri í BankNordik.

Í fráboðan sigur BankNordik, at við keypinum yvirtekur bankin 82.000 privatkundar og 10.000 vinnukundar, innlán fyri DKK 5,3 mia., útlán og ábyrgdir fyri DKK 4,9 mia. umframt goymsluvirði hjá kundum fyri DKK 10 mia. kr. Umleið 160 starvsfólk úr nøkrum av deildunum í høvuðstaðarøkinum umframt deildunum í Odense og Århus fara at taka sær av yvirtikna virkseminum. Partarnir eru samdir um, at tíðin fram til yvirtøkudagin skal nýtast til at taka avgerð um, hvørjar deildir og hvørji starvsfólk skulu reka virksemið framyvir.

## Íleggjarar fíggja

Keypið av nýggja virkseminum verður fíggjað lutvíst við egnum midlum og lutvíst við at styrkja bankans frammanundan sterka kapitalgrundarlag. Bankin hevur longu havt jaligt samskifti við útvaldar stovnsligar íleggjarar um íløguna. BankNordik hevur givið Nykredit heimild til at gjøgnumføra eitt útboð av kapitalprógvum sum hybridur kjarnukapitalur og/ella ábyrgdarlán til stovnsligar íleggjarar. Harumframt hevur Fíggjarligt Støðufesti givið bindandi tilsøgn um at læna BankNordik DKK 300 mió í ábyrgdarkapitali, treytað av, at bankin ikki rindar vinningsbýti í eitt tíðarskeið.

- Vit halda fram við leistinum at vera ein lokalur banki við tøttum sambandi við kundarnar. Samstundis hava vit kapitalstyrkina til at gera ein mun. Vit vilja fegin menna langtíðarsambond og sterk samstørv og taka atlit til tørvin hjá kundum okkara, bæði í góðum og ringum tíðum. Hesin leisturin hevur givið BankNordik góð úrslit, eisini undir búskaparkreppuni, og hevur samstundis tryggjað bankanum gott lønsemi, høgt kundanøgdsemi og ein rættiliga høgan solvens, sigur Janus Petersen, forstjóri í BankNordik.




# Hevði børn í viðførisrúminum

**Foreldur á Skála hava kært ein lærara fyri at hava fylt bilin við børnum, harav nøkur sótu í viðførisrúminum3**

Randi Jacobsen

Fyri smáum vikum síðan fóru tveir lærarar við fjórða flokki í Skála skúla ein biltúr til Gøtu

Bilurin, sum lærararnir koyrdu í, var ikki so stórur, at øll børnini kundu sita bundin, og tí vórðu trý børn koyrd í viðførðisrúmið til Gøtu og aftur.

Foreldrini vóru forfard, tá ið tey frættu hetta, og foreldrini at einum næmingi, sum sat í viðførisrúminum, vóru so skelkað, at tey kærdu tilburðin til Mentamálaráðið.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna váttar, at kæran er komin til Mentamálaráðið.

## Kanna kæruna

Men enn veit hon ikki, hvat gjørd verður við kæruna. Kærandi foreldrini hava valt at vera ónevnd, við tað at viðurskiftini á Skála eru so smá.

- Eg havi tí heitt á fyrisiting mína um at kanna, hvussu vit eiga at bera okkum at, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon sigur tó, at um innihaldið í kæruni er rætt, hevur Mentamálaráðið ein trupulleika, sum tað noyðist at taka støðu til.

Fyrsti lærari í Skála skúla hevur ikki hug at gera viðmerkingar til málið.

Hinvegin hevur Kári Thorsteinsson, formaður í nevndini fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd greiða mening um slíkan flutning av skúlanæmingum.

- Eg havi ongantíð áður hoyrt um slíkt. Hatta ljóðar ikki trygt. Vanligt er at flyta skúlanæmingar við skúlabussi, tí børnini skulu ferðast trygg millum heim og skúla. Vit eiga altíð at seta trygdina í hásætið. Næmingarnir eiga at sita fastspentir í bussinum, og vit fara ikki at mæla til nakað annað, heldur ikki sum undantak, sigur Kári Thorsteinsson, sum sigur seg væl skilja, at foreldur klaga um nevnda tilburðin.

Zvonko Mrdalo, formaður í skúlastýrinum á Skála hevur ikki hoyrt eitt orð um hendingina.